gult cyan magenta svart



# Herfølge hvessir álopið

**Dennis Conteh er keyptur úr Fraklandi og til Herfølge, har hann skal verður sáttmálabundin í stívliga tvey ár**

Hóast tað stendur illa til í Herfølge, so hava teir ikki givið skarvin yvir í royndini at leingja tilveruna í superliguni. Í fyrradagin frættist, at teir hava gjørt sáttmála við ein nýggjan álopsspælara. Talan er um 25 ára gamla Dennis Conteh. Hann hevur síðani 1997 verið sáttmálabundin í Strasbourg, sum spælir í bestu fronsku deildini.

Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá álopsspælaranum, sum hevur havt ilt við at spæla seg til fast pláss á liðnum. Í fjør var hann útleigaður til Viborg, har hann stóð seg hampuliga væl.

Felagið hjá Jákupi Mikkelsen hevur verið sera óheppið. Ikki færri enn átta spælarar hava drigist við skaðar. Onkrir av hesum eru um at vera tøkir aftur, so kanska fer tað nú at ganga rætta vegin. Fyrsta treytin fyri hesum er, at allir spælararnir sum ein smoyggja stríðshamin á seg.

Fyri trimum vikum síðani kom Jens Madsen aftur til Herfølge. Tað var hann, sum dygst undan kappingarbyrjan í summar fór til Grikkalands í staðin fyri at skriva undir nýggjan sáttmála við Herfølge. Hesum varð annars roknað við. Ferðin til Grikkalands gjørdist ikki nakað ævintýr. Tað var skjótt, at Jens Madsen fór til Skotlands, og nú er hann – sum ein annar burturvilstur sonur – komin aftur til Herfølge.

Tveir teir næstu dystirnir hjá Herfølge vera av alstórum týdningi. Sunnudagin skulu teir spæla á útivølli í Gladsaxe ímóti AB, og annan sunnudag skulu teir spæla á heimavølli ímóti Haderslev. Nýggi álopsmaðurin verður á liðnum longu komandi vikuskifti.

**jh**



*Jákup Mikkelsen*

# Linligt í Klaksvík



*KÍ vann ein tryggan sigur á B71*

**Men tað var eingin ivi um, at heimaliðið var væl betir fyri enn gestirnir úr B71**

Klaksvíkingar og sandoyingar hava tað til felags, at teir eiga ongar landsliðsspælarar. Tað fellur neyvan í góða jørð innanfyri Klakkin at siga, at klaksvíkingar eiga ongar landsliðsspælarar. Teir har norðuri kenna seg eiga part og lut í Jákupi, Toda, Kurt og Rógva. Men tað er ein veruleiki, at KÍ og B71 hava tað til felags, at tey eru ikki umboðað í landsliðsferðalagnum, sum í hesum døgum er í Russlandi.

Hesin veruleikin gjørdi, at tað bar til at fáa steypadystin, sum orsaka av kava ikki var spældur næstsíðsta sunnudag, frá hondini í fyrradagin. Á stóru rúgvunum kring vøllin sást, at klaksvíkingar høvdu verið óførir at skumpa kava av vøllinum.

Inni á vøllinum var avrikið nóg gott til sannførandi sigur á sandoyingum. Men avrikið boðaði ikki frá, um KÍ fer at vera væl fyri í landskappingini í summar. Ferðin var ikki serliga høg, og tað var sjáldan, at álopini vóru myndað soleiðis, at upplagdir møguleikar fingust burturúr. Trý mál komu í 2. hálvleiki. Tá var tað týðuligt, at sandoyingar vóru farnir at møðast, og at teir fegnir vildu hava eitt mál. Í hvussu so er vóru fleiri yvirtalsstøður til KÍ seinnapartin av seinna umfarinum.

## Málini

Miðskeiðis í 1. hálvleiki kom KÍ framum. Ove Nysted var málskjútti. Hann hevur máltev og var á rætta staðnum, tá sandoyarverjan meiri ella minni kiksaði í tí.

Hjalgrím Elttør er ein av ungu monnunum, sum teir í Klaksvík rokna nógv við. Sunnudagin arbeiddi hann nógv, tóktist væl upplagdur og skoraði tvey mál. Hitt fyrra var, tá hann økti til 2–0. Tomislav Sivic og Niclas Niclassen stóðu fyri uppspælinum í vinstru, lagt var út frá, og Hjalgrím var fyrstur á, eftir at Valdemar Nowisci hevði hálvbjargað skotroynd. Hitt seinna var til 4–0. Ta ferðina átti Hjalgrím sjálvur fyrireikingarnar, og skotið kom úr trettan metrum.

Rúni Elttør hevur einki spælt á besta KÍ liðnum. Hann kom nakað út í 2. hálvleik inn á vongverjan í vinstru. Bóltevnini og spælskilið eru eyðsýnd, og kanska var tað fyrstu ella aðru ferð, at hann nart bóltin, tá hann aftanfyri handara stólpan stútaði hornasparksinnlegg úr høgru í kassan.

## Eyðsýndir veteranar

Einki er at ivast í, at KÍ fer at vera við í kappingini um pláss í fjórðingsfinaluni í steypakappingini. Men tað sigur ikki so nógv, tí tað verða bara fýra av teimum tólv liðunum í bólkaspælinum sáldað frá, áðrenn tað verður komið til fjórðingsfinalurnar.

Um B71 fer at megna at spæla seg víðari er ivasamt. Hjá Kára Reynheim er tað ein stór avbjóðing at fáa liðið at rigga. Tað eru fleiri nýggir spælarar á liðnum, og teir tykjast ætla sær at royna við flatari verju.

Á liðnum, sum var í Klaksvík, vóru fleiri havnarmenn, enn tað vóru sandoyingar. B71 megnaði so at siga ikki at spæla seg í vandamikla støðu. Eyðsýndasti maðurin hjá teimum var Eli Hentze, sum tóktist hava væl betri spælfatan enn fleiri av liðfeløgunum.

Allan Joensen hjá KÍ tykist eftir drúgvan skaðasteðg av hava vunnið fótbóltsførleikan aftur (nú mugu vit banka uppundir borðið). Hann er kærkomin styrkur á miðvøllinum. Umframt Hjalgrím Elttør var ein annar ungur maður – Atli Danielsen – á liðnum. Hann er bólttryggur. Aðrir ungir menn, sum komu á vøllin, vóru Erling Fles g Jóannes L. Jacobsen.

KÍ: Meinhard Joensen – Atli Danielsen, Jan Andreasen, Niclas Niclassen – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Allan Joensen, Fríðin Ziskason – Hjalgrím Elttør, Tomislav Sivic, Ove Nysted

B71: Valdemar Nowisci – Svenning Hansen, Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen, Hans Meinhard Midjord – Bárður Bærentsen, Bergleif Sólsker, Julian Floresco, Bjørn Thorsteinsson – Eli Hentze, Símun Hansen



# Ósigraður

**Árið 2001 hevur hilnast serstakliga væl hjá heimsins fremsta telvara Gary Kasparov. Triði kappingarsigur á rað fall honum í lut í sterkari kviktalvskapping í Cannes um vikuskiftið.**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Stóri spurningurin í talvheiminum hevur hesar seinastu mánaðirnar verið, hvussu Kasparov fór at takla tapið av HM-heitinum til Vladimir Kramnik seinasta heyst. Í samfull 16 ár hevur Kasparov verið besti telvari í heiminum, av flestu mettir at vera besti nakrantíð. Tapið ímóti Kramnik var fyrsta dystartap sum heimsmeistari.

Men onki kann steðga russiska úlvinum, sum hóreiggjar sær millum lombini. Kasparov er ósigraður síðan hann misti krúnuna, og í kvikkappingini í Cannes, Frankaríki, sum endaði í sunnudagin, var hann aftur suverenur og vann í finaluni móti landsmanninum Evgeny Bareev. Bareev var sekundantur hjá Kramnik og var skjótur at viðmerkja aftaná HM-dystin, at Kasparov epokan var av. Men stórsigrar í og Wijk aan Zee, Linares og nú í Cannes, tala sítt egna mál.

## Sterk kapping

Kvikkappingin varð sera sterk, har eitt nú Adams, Morozevich, Judit Polgar, Svidler og Grischuk vóru millum luttakararnar. Á vegnum til sigurs basti Kasparov stjørnuni frá Tórshavn Open Grischuk, sum hevði enn eina framúrskarandi kapping og endaði millum fýra teir bestu. Grischuk er bert 17 ár og verður mettur at mennast fyri hvønn dag sum gongur.

Kasparov epokan heldur fram.

## Olaf Berg vann

Ein annar sum í hesum tíðum eisini er ósigraður er ungi Olaf Berg úr Havnini. Hann vann trygt og suvirent eina opna rataða kapping sum hevur verið telvað í hølum Havnar Telvingarfelags í vetur.

Olaf fekk heili 8,5 stig av níggju møguligum, sum er sera flott tá hugsað verður um manningina í kappingini, við eitt nú Herluf Hansen, Martin Brekká, Haldur Suni Johansen, Suni Merkistein og Jóhan Gaard. Jóhan, Herluf og Martin komu næstir í røðini.

Í Danmark luttók Eyðun Nolsøe í vikuskiftiskapping í Birkerød. Honum eydnaðist at fáa trý stig av fimm møguligum, og gav hetta honum eitt annað pláss.

## Talvið hesa vikuna

Diagram: Endastøðan eftir Kd3

**Kasparov,G (2849) - Bareev,E (2704)**
**Rapid Chess World Cup, Final**

1.e4 e6 2.d4 d5 3.Nd2 c5 4.Ngf3 Nc6 5.exd5 exd5 6.Bb5 Bd6 7.dxc5 Bxc5 8.0-0 Nge7 9.Nb3 Bd6 10.Re1 0-0 11.Bg5 h6 12.Bh4 Bg4 13.Bg3 a6 14.Be2 Re8 15.Nfd4 Bxe2 16.Rxe2 Qd7 17.Bxd6 Qxd6 18.Qe1 Kf8 19.Qc3 Nxd4 20.Nxd4 Nc6 21.Rae1 Qb4 22.Qxb4+ Nxb4 23.Kf1 Rxe2 24.Kxe2 Re8+ 25.Kd2 Rxe1 26.Kxe1 Ke7 27.Kd2 g6 28.a3 Nc6 29.Nxc6+ bxc6 30.c4 Kd6 31.Kd3 a5 32.b3 Kc5 33.cxd5 Kxd5 34.Kc3 h5 35.h4 f6 36.Kd3 g5 37.g3 gxh4 38.gxh4 f5 39.f3 Ke5 40.Ke3 c5 41.f4+ Kd6 42.Kd2 Kc6 43.Kc3 Kb5 44.Kd3



Her gevst Bareev. Endastøðan er vunnin hjá hvítum. Hvítur hevur oppositiónina, og hevur við a4 eitt tempo at brúka. 1) Kb6 45.Kc4 Kc6 46.a4 og hvíti kongur hevur frítt at fara. 2) Kc6 45.Kc4 3) Ka6 45.Kc4 Kb6 46.Kd5 Kb5 47.Kd6 c4 48.bxc4 Kxc4 49 Ke6 sum vinnur 4) a4 45.bxa4 Kxa4 46. Kc4. 1-0

# Teir eru í øðini í FCK



**Tað verður roknað við, at Todi verður burtur frá FCK liðnum í fýra vikur, og ítróttarstjórin gevur ilt av sær og ætlar at tosa við Allan Simonsen**

FÓTBÓLTUR

Ítróttarstjórin í FCK eitur Niels Christian Holmstrøm. Inntil fyri einari fjórðings øld síðani var hann ein vandamikil álopsspælari hjá KB, og hann dugdi eisini at brúka mussaskøðið. Tað dugdi hann eisini, tá hann var venjari í feløgunum, sum nú mynda FCK – tey eita KB og B1903.

Nú hevur Niels Christian Holmstrøm ábyrgdina av spælarunum, og hann var ikki blíður, tá hann í fjølmiðlunum frætti, at Todi Jónsson var komin skaddur aftur til Keypmannahavnar:

– Todi er skaddur hvørja ferð, hann kemur aftur úr Føroyum. Hetta ber ikki til, og eg ætli mær so skjótt, sum tað ber til, at hava eitt prát við Allan Simonsen um hetta, segði ein ikki serlig blíður Niels Christian Holmstrøm við BT í fyrradagin.

## Fýra vikur uttanfyri

Seinnapartin í fyrradagin vitjaði Todi Jónsson liðfelagarnar í FCK. Teir vandu og settu harvið sjøtul á eina spennandi viku. Sunnudagin skulu teir spæla í Brøndby. Har rúmast omanfyri 30 túsund áskoðarar. Í fyrradagin vóru fleiri enn 22 túsund atgongumerki seld. Hetta verður dysturin á várinum í Danmark.

Todi Jónsson fekk ikki vant saman við liðfeløgunum, sum góvu til kennar, at teir harmast um skaðan. Tað gjørdi venjarin, Roy Hodgson, eisini. Læknin hjá FCK var ikki til staðar. Fysioterapeuturin kannaði lærið, og hann metti, at tað fara at ganga fýra vikur, áðrenn álopsessið hjá FCK aftur kann spæla:

– Tað kendist sum ein lætti at hava verið í felagnum aftur. Eg hevði roknað við, at skaðatíðin fór at verða fýra vikur. Tað nyttar einki at iðra seg um tað, sum er farið. Nú er takið at koma fyri seg aftur. Eg vænti, at eg fari at súkkla í dag. Kanska verður møguleiki fyri at smárenna í komandi viku. Eg vóni, at tað um tríggjar vikur fer at bera til at venja við bólti, og um alt gongur væl, so vóni eg at hava møguleika at spæla við aftur um ein mánað, segði Todi Jónsson í gjár.

Í dag fer hann at fylgja við í, hvussu tað fer at hilnast hjá liðfeløgunum á landsliðnum í Moskva, og sunnudagin verður hann ímillum áskoðararnar í Brøndby, har teir rokna við, at hvør einasti sessur verður upptikin.

**jh**

# Nú byrja rennikappingarnar aftur

TÍÐINDASKRIV

Fyrsta rennikappingin í ár verður hildin leygardagin í Runavík. Tað er tann árliga 10 km kappingin, ið Roysnið skipar fyri.

Eins og undanfarin ár verður byrjað omanfyri Miklagarð. Runnið verður úteftir til Sjómansheimið, har sneitt verður oman á keiina. Síðan verður runnið inn eftir Gulasteinsvegi og niðan á vegin áraka Føroya Banka, har sneitt verður úteftir aftur. Henda leið skal rennast góðar 9 ferðir.

Seinastu ferð koma rennararnir á mál við Sjómansheimið.

Bestu tíðir í hesi kappingini hava Sunnevá Bjarnastein, ið rann 39,51 min í 1999 og Guttorm Sørensen, ið rann 33,20 min í 1998.

Annars undirstrika fyrireikararnir, at øll eru vælkomin at luttaka leygardagin. Hóast vinnandi kvinnan og maðurin fáa steyp, eru vanliga nógv, ið serliga renna við fyri at kappast við seg sjálvan.

Kappingin byrjar leygardagin kl. 14.30. Tilmelding er við Sjómansheimið hálvan tíma undan kappingini.